# Nú verða fleiri fartelefon-útbjóðarar



*Fyrst var tað fastnetið, ið bleiv opið fyri øðrum fyritøkum enn Føroya Tele. Nú er stundin komin til tað tráðleysa sambandið. Fjarskiftiseftirlitið er um stutta tíð liðugt við útbjóðingartilfarið, og tá er klárt at geva øðrum tele-fyritøkum loyvi at bjóða tráðleyst samband til føroysku brúkararnar.*

Rúnar Reistrup

Nú røkist fyri at fleiri fartelefonútbjóðarar sleppa inn á føroyska telesamskiftismarknaðin. Fyri góðum ári síðan varð tað sokallaða fastnetið, tað vanliga telefonnetið, latið upp fyri øðrum útbjóðarum, og um ikki so langa tíð fara aðrir útbjóðarar - føroyskir sum útlendskir - at fáa møguleikan at bjóða seg fram á marknaðinum fyri tráðleysum fjarskifti, millum annað við fartelefonkervi.

### Gera klárt til útbjóðingina

Fjarskiftiseftirlitið arbeiðir í løtuni við útbjóðingartilarinum sum skal liggja til grundar fyri útbjóðanini av sokallaðum koncessiónum til at reka tráðleyst fjarskiftiskervi.

Ein slík koncessión gevur havaranum rætt til annaðhvørt sjálvur at uppbyggja egið tráðleyst fjarskiftisnet ella leiga seg inn á eitt slíkt. Sum er, er Føroya Tele einasta fyritøka, ið hevur atgongd til mobila fjarskiftismarknaðin, men í tráð við løgtingslógina um fjarskifti, sum millum annað hevur til endamáls at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum, verður hetta nú broytt.

### Tráðlesyir møguleikar

Í fyrstu syftu fer hetta at hava við sær, at kapping verður millum ymiskar útbjóðarar á marknaðinum fyri fartelefonsamskifti. Men tráðleyst fjarskiftiskervi hevur gyltar framtíðarvánir innan dataflutning. Startskotið kom longu við møguleikanum at senda stutt tekstboð millum GSM telefonir, og annað umfar byrjaði fyri ikki so langari tíð síðan við sokallaðu WAP-tøknini, sum gevur møguleika at knýta fartelefonir til internetið.

Hetta slagið av dataflutningi yvir tráðleyst kervi má tó metast sum byrjunarstøði til framtíðar møguleikar.

### Kappingin fer at merkjast

Fyri brúkaran fer kapping innan tráðleyst fjarskiftið helst at merkjast við príslækkingum og øktari ferð í menningini av tráleysum tænastum, metir Jógvan Thomsen, stjóri á Fjarskiftiseftirlitinum.

Í londunum kring okkum hava brúkararnir eisini merkt kappingina á annan hátt, nevniliga við víðgongdum kampanjum hjá fjarskiftisútbjóðarum, sum bóru við sær, at fartelefonir eina tíð vórðu seldar fyri bara eina krónu, um brúkarin harafturfyri vildi binda seg til útbjóðaran í eitt hálvt ár.

At fartelefonir verða seldar við stórum avslátturi, um brúkarin samstundis bindir seg til ein útbjóðara, er galdandi enn í teimum londunum, har kapping er á økjunum, men tó í nakað minni mun.

At vit fara at uppliva tað sama her í Føroyum, tá kapping kemur á økinum, er ikki óhugsandi heldur Jógvan Thomsen.

### Avmarkað tal av útbjóðarum

Sambært stjóranum á Fjarskiftiseftirlitinum er áhugin fyri at sleppa at bjóða út tráðleys fjarskifti stórur, men væntandi verða tað bert veittar tvær ella tríggjar koncessiónir til at veita tráðleyst fjarskifti, umframt hana, sum Føroya Tele longu nú hevur.

Á Fjarskiftiseftirlitinum stíla tey ímóti, at útbjóðingartilfarið skal vera klárt beint eftir summarferiuna, men nær fyrsti nýggi útbjóðarin fer at bjóða tráleyst kervi út, ber ikki til at siga við vissu.

Verður samanborið við útbjóðingina av koncessiónum til tráðborið fjarskiftiskerv, so gekk eitt lítið ár frá tí at fyrsta koncessiónin varð latin, til viðkomandi felag hevði samrátt seg fram til eina avtalu við Føroya Tele og kundi fara í gongd við at bjóða tænastur út. Helst verður nakað tað sama galdandi fyri ta tráðleysa kervið, metir Jógvan Thomsen, stjóri á Fjarskiftiseftirlitinum.

# Liberalisering á fjarskiftisøkinum

*Síðan nýggja lógin um fjarskifti bleiv samtykt fyri trimum árum síðan, er nógv hent á hesum øki. Heili sjey fyritøkur hava hetta seinasta góða árið fingið sokallaðar konsessiónir, ella loyvi, at bjóða út fjarskiftistænastur*

Rúnar Reistrup

Við løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, varð grundarlag lagt fyri fríari kapping á føroyska fjarskiftismarknaðinum. 29. november í 1997 varð Fjarskiftiseftirlitið sett á stovn við tí endamáli at umsita hetta málsøki.

Stovnurin bleiv síðan bygdur upp, og 15. mars í fjør fekk Føroya Tele, sum frammanundan hesum hevði havt einkarætt til at reka fjarskiftiskervi, ístaðin eina koncessión, ella loyvi, frá landsstýrismanninum í vinnumálum eftir tilmæli frá Fjarskiftiseftirlitinum.

Við hesum var einkarætturin hjá higartil einasta fjarskiftisveitara í Føroyum ikki bara formelt, men eisini praktiskt avtikin.

Stutt eftir varð konsessión givin til Sp/f MET og síðan tá hava Sp/f Ravmagn, Sp/f Alnót, Iridium, Sp/f Teletænastan og P/F Farodane øll fingið meira og minni umfatandi koncessiónir til at reka fjarskiftiskervi.

Tað mest umfatandi loyvið at reka fjarskiftiskervi er enn tað hjá Føroya Tele. Hareftir eru tey mest umfatandi loyvini tey hjá Sp/f Teletænastuna og Sp/f Alnót.

Stóri munurin millum hesi loyvini er heimildin at reka mobilt fjarskiftiskervi, sum bert Føroya Tele, sum er hevur loyvi til. Men sum viðgjørt í greinini omanfyri, er hetta nú við at broytast.

*Tað er ikki meira enn eitt gott ár síðan, at Føroya Tele stóð einsamalt á føroyska fjarskiftismarknaðinum. Nú hava seks aðrar fyritøkur avmarkaði loyvi at reka fjarskiftiskervi*






